# Stóra skipaða várútsølan av føroyskum bókum í mars

Stóra bókaútsølan, sum er triðja hvørt ár, verður í døgunum 26. mars til 3. mai 2003



ÚTSØLA

Í 1988 varð fyrstu ferð skipað fyri útsølu av føroyskum bókum. Bókhandlarafelagið og Bókadeild Føroya Lærarafelags skipaðu fyri og hetta var stórhending tá. Nú vóru so nógvar føroyskar bøkur, at til bar at skipa fyri rimmar útsølu við fleiri hundrað bókum.

Men tað er kortini greitt, at føroyski bókamarknaðurin er so mikið avmarkaður, at tað ber ikki til at halda útsølu hvørt ár. Tí er føroysk bókaútsøla bara 3. hvørt ár og bøkurnar, ið verða seldar á útsølu, skulu í minsta lagi vera 3 ára gamlar. Tá ið tær hava verið á tveimum útsølum, sleppa tær ikki við aftur.

Nú er so aftur bókaútsøla á skránni í døgunum 26. mars til 3. mai. Bókadeild Føroya Lærarafelags sendir í hesum døgum bræv til øll forløg, har boðað verður frá hesum og greitt verður frá treytunum at sleppa upp í part. Lýsing verður eisini sett í bløðini, so fólk, ið kanska eiga bøkur, sum stigtakararnir ikki vita um, kunnu gera vart við seg.

Stór útsøluavís verður prentað og send í øll hús í landinum nakrar dagar, áðrenn útsølan byrjar. So kunnu fólk í frið og náðum kunna seg við útsølubøkurnar.

# Postgjøld og dagrøktarskipan

Høvuðssøgan hjá Sosialinum 18. januar í 1978, sum var ein mikudagur, var, at postgjøldini hækka




FYRI 25 ÁRUM SÍÐANI

*Eirikur Lindenskov*

Aðrar forsíðusøgur í Sosialinum fyri neyvt 25 árum síðani vóru, at Torshavnar Uttanbíggjar kommuna fer at seta á stovn dagrøkt, og at ísfiskatrolararnir fara eystureftir.

Blaðið greiðir frá, at postgjøldini skuldu hækka 1. november í 1977. Men av tí, at eingi frímerki við teimum virðum, ið skuldu verða galdandi, vóru tøk, vórðu ikki allar hækkingar settar í gildi. At senda eitt vanligt bræv hevði higartil kostað 1,25 krónur, hetta skal broytast til 1,40 kr.

Sosialurin sigur eisini, at tað kostar tað sama at senda brøv, prentlutir, smápakkar og postkort innanoyggja og til hini Norðurlondini. Tað er ein avtala millum londini, at gjaldið fyri nevnda post skal vera tað sama innanlands sum til onnur Norðurlond.

Esbern Midjord, postverkstjóri, upplýsir fyri Sosialinum, at í teimum níggju mánaðunum, sum farnir eru av fíggjarárini (sum tá var frá 1. apríl – 31. mars) hava inntøkur Postverksins av postgjøldum verið 7,7 milliónir krónur, t. v. s. at føroyingar senda post fyri umleið 28.000 krónum um dagin.

**Dagrøkt uttanbíggja**

Hendan 18. januar í 1978 skrivar Sosialurin eisini um, at Tórshavnar Uttanbíggjar kommuna (tað eru kommunurnar uttan fyri Havnina: Argir, Hoyvík, Syðradalur og Norðadalur) nú eisini fær eina dagrøktarskipan fyri børn í aldrinum 0-7 ár.

1. januar í 1978 var ein dagrøktarleiðari settur, tað var Thomasia Matras.

Sam Hansen, sum var skrivari hjá Uttanbíggjarkommununi, sigur við Sosialin, at roknað verður við, at tað verða eini 30 dagrøktarpláss á Argjum og í Hoyvík.

Eitt dagrøktarpláss kostaði tá 1.100 krónur. Av hesum rindar staturin 40%, kommunan 30% og foreldrini 30%.

## EG MEINI TAÐ

# »Frystiboksin« - hvat er fyrimunurin?



*Elin Heinesen skrivar:*

Eg eri greið yvir, at eg eri inhabil! Eg arbeiði jú sum samskipari á nýggju føroysku rásini hjá Televarpinum - Rás 1, sum enn ikki er farin at senda - so onkur fer helst at hugsa, at eg bara skrivi hetta, tí at eg royni at selja Televarpið, sum tann loyali meðarbeiðarin eg jú skal vera… Á ja, fólk mugu hugsa tað, tey vilja, men hetta er so mín persónliga áskoðan. Inhabil ella ei.

Eg veit tað gott, at Televarpið hevur havt sínar byrjunartrupulleikar, men eg haldi eisini, at fleiri hava gjørt tað eitt sindur verri, enn tað er. Tað er sum við úlvum. Fer ein at ýla, fylgja allir hinir eftir, og skjótt ýlur annar harðari enn hin, til allur flokkurin er farin upp at gartera. Og vit menniskju eru so innrættað, at hava vit fyrst sett okkum nakað í høvdið, so halda vit treiskt fast við tað. Hatta er gott og hatta er ringt, og eingin f... skal koma her og sannføra meg um nakað sum helst annað!

Tak nú digitala móttakaran - ella set-top boksina, sum hálar digitala signalið frá Televarpinum úr antennuni inn í sjónvarpið, soleiðis at til ber at síggja allar hesar nýggju sjónvarpsrásirnar. Tummulfingurin niðureftir - ikki so? Ert tú eisini ein av teimum, sum ýlur við í tummulfingrar-niðureftir-kórinum? Tað er jú so 'in' at vera ónøgdur í dag. Jú jú, sanniliga hava trupulleikar verið við at fáa skipanina at virka ordiligt. Trupulleikar, vit einki kendu til í teim góðu, gomlu Rás Tórshavn døgunum. Tað skerst ikki burtur. 'Frystiboksin' er hon blivin doypt á mannamunni - og heilt við síðuna av er tað ikki.

Men...! Eg havi sjálv havt parabol í fleiri ár, og veitst tú hvat? Umframt eyka trupulleikan við stóru, óstortligu parabolini, sum kvinkaðist av lagi hvørja ferð nógvur vindur var (sjálvt um menninir frá radiohandlinum bedýraðu, at NÚ høvdu teir skrúvað hana so fasta, at hon vikaðist ikki aftur!) ja, so hevði eg akkurát somu trupulleikar við tí móttakaranum, sum hálaði signalið úr parabolini yvir í sjónvarpið, sum eg havi havt við hesi nýggju 'frystiboksini'! Parabolboksin var ikki petti betri - hon frysti og mátti sløkkjast og tendrast í heilum fyri at koma aftur í rættlag. Ræðuliga troyttandi, so púra vist, men hatta er ikki nakað nýtt! Og slettis ikki nakað eindømi fyri Televarpsboksina.

Digital tøkni ER í heila tikið sera viðkvom. Teldur t.d. frysta eisini í heilum. Tað er eisini ræðuliga troyttandi, men vit hava líkasum vant okkum við, at hatta er ER bara so - næstan sum ein náttúrulóg. Hava vit fyrst vant okkum við at brúka teldu, kundu vit ikki droymt um at valt hana frá, bara tí hon frystir av og á. Vit eru glaðari enn so fyri fyrimunirnar við henni. Ofta er tað ein forrita-trupulleiki og vit uppgradera og uppgradera og vóna, at ein dag verður tøknin so framkomin, at vit heilt sleppa undan at brestast við hesar óluksáligu frystitrupulleikarnar.

Við vanligum teldum hava vit lyndi til at fokusera á allar møguleikarnar í tøknini, heldur enn vansarnar, tí víst eru teir spennandi - og hava kanska eisini verið meira týðiligir at síggja fyri sær, enn teir møguleikarnir 'frystiboksin' hevur. Ja, tú las rætt! 'Frystiboksin' er jú eitt slag av teldu, og hevur eisini í sær - eins og aðrar teldur - fantastiskar møguleikar, sum vit enn bara hava sæð ein pinkulítlan promillupart av. Møguleikar fyri t.d. spennandi interaktiviteti millum síggjaran og sjónvarpið. Umframt at senda sjónvarp, har myndirnar eru nógv klárari enn í vanligum sjónvørpum, fer boksin eisini at gera tað møguligt innan stutta tíð t.d. at spæla (føroysk framleidd) spøl, vedda, chatta, date'a og keypa (føroyskar) vørur via sjónvarpið!

Hetta arbeiða vit við í løtuni at gera veruligt á Rás 1, sum við tíðini fer at síggjast um alt landið, so hvørt sum útbreiðslan av Televarpinum verður størri. Umframt at vit helst fara at senda lokal tíðindi úr øllum landinum, undirhaldssendingar, ítrótt og mangt annað spennandi á rásini. Alt bara føroyskt tilfar! Eg haldi tað er eitt sindur synd fyri tey, ið lótu seg freista av at keypa parabol, tí tey hava avskorið seg frá øllum hesum spennandi serføroysku møguleikunum, sum fara at koma, tá nýggja rásin - Rás 1 - fer at senda á Televarpinum. Spell fyri tey, men tey vistu kanska ikki um hetta...!?

Ja, ja - eg veit! Eg ERI inhabil, men fá kenna teir fantastisku framtíðarmøguleikarnar við hesum betur enn eg, og eg helt bara, at eg mátti avdúka eitt lítið sindur av okkara spennandi 'loyniligu' ætlanum - bara fyri tær, so tú veist tað!

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: turid@sosialurin.fo

Blaðstjórn: Turið Kjølbro



*Jens Jensen, Tórhild Magnussen og Asbjørn Djurhuus eru millum teirra, sum fyrireika ferðina til Danmarkar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Ver glað mín sál og hevja ljóm

Á páskum fara gott 20 tjørnuvíksfólk til Danmarkar at syngja Kingo. Tey fara at luttaka í hátíðarhaldi, sum hildið verður í Danmark alt ár í sambandi við, at 300 ár eru liðin, síðan sálmaskaldið Thomas Kingo doyði

SANGFERÐ

*Edvard Joensen*

**Tjørnuvík:** Tjørnuvíksfólk syngja Kingo. Sum tey einastu í heiminum. Og tí fara tey til Danmarkar á páskum at syngja gomlu Kingoløgini fyri dønum, sum hátíðarhalda, at tað eru liðin 300 ár síðan Thomas Kingo doyði.

– Som den gyldne sol frembryder, syngja tey trý tjørnuvíksfólkini, sum eru komin í kirkjuna við okkum at vísa og lata okkum hoyra, hvat tað er, tjørnuvíksfólk fara til Danmarkar at syngja á páskum.

– Tað virkar eitt sindur óveruligt, at vit, sum bara eru amatørar úr eini bygd við færri enn 70 fólkum, skulu vera boðin av Keypmannahavnar biskuppi til Danmarkar at syngja á staðnum, har Kingo virkaði og doyði. Tað fer at hava árin á nógv av teimum eldru fólkunum, sum eru við í bólkinum, sigur ein av fyrireikarunum og sangarunum, Asbjørn Djurhuus í Tjørnuvík.

Tey siga í Tjørnuvík, at tað man vera fyrrverandi prestur teirra, Martin Restorff Jacobsen, sum mestsum hevur spunnið hetta í. Hann er áhugaður í tí sangi, sum har verður sungin og spyr javnan eftir, hvussu gongur, sigur Asbjørn Djurhuus. Hann hevði vist sæð í Kristeligt Dagblad, at hetta hátíðarhaldið skuldi vera í Danmark.

– Eg havi hann mistonktan fyri at hava ein fingur við í spælinum, nú biskuppurin í Keypmannahavn hevur boðið okkum við.

Tað kostar nakað av peningi at gera eina slíka ferð, og søkt er eisini um stuðul, ymsastaðni frá, siga tey í Tjørnuvík.

Men vónir eru fyri, halda tey, at tað fer at bera til at fíggja hesa ferðina. Farið verður við flogfari úr Føroyum til Billund tann 14. apríl, og komið verður so aftur tann 22. sum er triði páskadagur.

Umframt at sungið verður í Fraugde á Fyn, har Thomas Kingo búðu seinastu ár síni, veður eisini vitjað í Samuelskirkjuni í Keypmannahavn, har onkur framførsla eisini verður. Har er tað føroyska kirkjuliðið við Bergi Jacobsen sum presti, sum er vertur, siga tjørnuvíkingarnir.

Tey leggja skrá í Tjørnuvík í hesum døgum. Hon verður nokk ikki so long, halda tey. Men so mikið, at tað fer at bera til at geva dønum eina hilling á, hvussu gamli sálmasongurin helst hevur ljóðað í Danmark eisini á døgum Kingo eini hundrað ár eftir trúbótina.

Í dag meta tey, at tað er gamli, gregorianski sangurin, sum mest líkist kingosanginum í Tjørnuvík.

Tað hevur ikki altíð verið líka lætt at sungið Kingo ella fyri tann skuld at lisið lestur heldur í føroyskum kirkjum í gomlum døgum, veit ein av sangarunum, Jens Jensen, at siga. Hann vísir okkum eina lestrarbók hjá Brockmann og eina sálmabók hjá Kingo, sum báðar eru prentaðar við gotiskum stavum.

Sálmabókin hjá Kingo letur einki vera tilvildarligt. Sálmarnir eru settir upp soleiðis, at viðmerkt er ikki bara hvønn dag, teir skulu syngjast. Nei, eisini nær í sjálvari guðstænastuni, teir skulu verða sungnir. Fyri ella eftir prædiku, fyri at eingin ivi skal vera.

– Nú veit eg ikki, hvussu tey hava skilt hetta fyrr, sigur Jens, men hjá okkum var tað ov torført. Vit hava tí skrivað teir sálmarnar av, vit ætla at syngja, soleiðis at vit nú hava teir á nútíðarskrift.